www.torshavn.fo

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## KT-FÓLK

**Tórshavnar kommuna søkir eftir KT-fólki til KT-deildina at byrja 4. januar 2010. Talan er um eitt áhugavert starv við góðari fakligari og persónligari menning.**

### KT-DEILDIN

hevur ábyrgdina av allari kunningartøkni, herundir telefoni, teldum, tunnum klientum og prentarum hjá fyrisitingini og stovnum. Í Kt-skivuni brúka vit Service Desk Plus, NetOp og fleiri onnur smærri forrit.

### SUM KT-FÓLK Á KT-DEILDINI VERÐA ARBEIÐSUPPGÁVURNAR HJÁ TÆR M.A. HESAR

- Tænastuveiting í breiðum høpi bæði innan ritbúna og tólbúna
- Finna og skráseta feilir og trupulleikar, klassificera og diagnostisera, gera bráðfeingis loysn, og hava eftirlit, flokking og samskifti um trupulleikan
- Manna Kt-skivuna og tú verður við til at styrkja førleikan hjá okkara brúkarum

### VIT LEGGJA DENT Á

- at tú er útbúgvin teldustøðingur
- at tú ert røkin, arbeiðir sjálvstøðugt, og er til reiðar at taka eina hond í, tá á stendur
- Royndir við Microsoft forritum og við tænastuveiting er ein fyrimunur

### SETANARVIÐURSKIFTI

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

### UMSÓKN

við prógvum og viðmælum skal vera hjá Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 12. november 2009, kl 12. Merkið brævbjálvan „KT starvsfólk".

### MEIRA FÆST AT VITA

um starvið og Kt-deildina við at venda sær til Inga Ellingsgaard, Kt-leiðara, á tlf. 30 20 10 ella á ingi@torshavn.fo.

## PEDAGOGUR

**Tórshavnar kommuna søkir vegna Dagstovnin á Landavegnum eftir einum pedagogi til barnagarðsstovu at arbeiða 20 tímar um vikuna at byrja 15. november 2009 ella eftir nærri avtalu.**

### SETANARVIÐURSKIFTI

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

### UMSÓKN

Umsókn saman við viðmælum, royndum og upplýsingum um útbúgving skal vera hjá Dagstovninum á Landavegnum, Landavegur 84, 100 Tórshavn, í seinasta lagi hósdagin 5. november 2009.

### MEIRI FÆST AT VITA

um starvið við at venda sær til Kirstin Djurhuus, stovnsleiðara, á tlf. 30 23 80, ella Brynhild Guttesen, varaleiðara, á tlf. 25 07 04. Ella hygg á heimasíðu okkara 123hjemmeside.dk/dag_land.

## PEDAGOGUR

**Tórshavnar kommuna søkir vegna Býlingshúsið undir Fjalli eftir einum pedagogi til barnagarðsstovu við 5-6 ára gomlum børnum at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 1. desember 2009 ella eftir nærri avtalu.**

### SETANARVIÐURSKIFTI

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

### UMSÓKN

saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera hjá Býlingshúsinum undir Fjalli, Fjalsgøta 25, 100 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 6. november 2009.

### MEIRI FÆST AT VITA

um størvini við at venda sær til Ingigerð Holm, stovnsleiðara, tlf. 22 85 25, ella Birnu Mikkelsen, varaleiðara, tlf. 25 08 06, og við at hyggja á heimasíðu okkara www.undirfjalli.i.fo

## DAGRØKTARI

**Tórshavnar kommuna søkir eftir dagrøktara at byrja skjótast gjørligt.**

### SETANARVIÐURSKIFTI

Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

### UMSÓKN

saman við royndum, upplýsingum um útbúgving og møguligum viðmælum skulu sendast Dagrøktarskipanini, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 6. november 2009. Umsóknir eftir hesa tíðarfreist kunnu vera aktuellar.

### MEIRI FÆST AT VITA

um starvið við at venda sær til Joan Simonsen, leiðara, á tlf. 21 40 48, ella Sólvá Sondum, varaleiðara, á tlf. 21 40 49.

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER LANDSINS STØRSTA KOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja sera stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava eina nútímans og opnan leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta vit somuleiðis innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA